## TIM -Halle :4.-11. August 2010

## Lutað tína trúgv við onnur

**Aldur :** 15-17 ár.
**Hvar:** Halle (Saale) Samkoma: Evangeliumsgemeinde
**Prísur**: Kr. 900,- (Ferðakostnaður ikki íroknaður.)

**Halle,** er ein býur við nógvum møguleikum og nógvum avbjóðingum, men Halle er eisini kendur fyri at tað eru sera fá játtandi trúgvandi. Vit hava brúk fyri tínum vitnisburði, kom og verð ein sum skapar vón milllum tey ungu í Halle saman við okkum !

Tú hevur gávur og evnir, sum tú kanst brúka til æru fyri Harran. Verið tað nú í tónleiki, ítrótti ella kanska tú ert ein vinarligur persónur ið dugir væl at lurta, ella kanska tú ert ein bønar-hermaður. Kanska hevur tú aðrar handaligar gávur og kanst hjálpa okkum í samband við umbyggingina av okkara ungdóms-Café. Ella tú kanska elskar at vera saman við børnum. Men tað kann jú eisini vera so, at tú als ikki veist hvørjar gávur tú hevur! Kom til Halle, so finna vit útav tí. ☺

**Hvørjir "Outreach" møguleikar eru so ?**

- Tú kanst spæla ymiskan tónleik og syngja
- Ítróttur / Spøl í eini park
- Barnatiltøk: Andlitsmáling, gera djór o.a. úr luftballónum og ymiskt annað.
- Tiltøk á Ellisheimum, hvar tú kanst vera saman við einum øðrum ættarliði.
- LichtHaus (Ungdómshús) handaligt arbeiði
- Kreativ gøtu-missión
    - Hvat ert tú góður til ? Brúka tínar gávur og evnir til at deila tína trúgv við onnur.
    - Far tíðliga upp, og verð ein signing fyri onnur.
    - Spurnarkanningar/Samtalur
    - Geva blómur
    - Og nógv annað
    - Vit skipa fyri venjing og hava eisini verkstøð í samband við hvørt outreach sær.

Tú fært eisini ein frídag hvar tú kanst hyggja teg um í Halle. Har eru nógvir handlar av ymiskum slag. Tú kanst eisini njóta tað vøkru náttúruna við at fara ein túr í kano, ella bara slappa av, hyggja teg um og njóta tilveruna.











Nærri upplýsingar : Anita 597842 anita@teenstreet.fo Ruth ruth@teenstreet.fo 519090